gult cyan magenta svart



# Bygdaskúlin er mentanardepil

*– Lati› børnini og ungdómin kunna seg um føroyska mentan og hjálp teimum at fata a›rar mentanir og samspæl manna vi› náttúruna seg›i Torbjørn Jacobsen, landsst‡risma›ur á samkomu á Velbasta› leygardagin, tá n‡ggi skúlin í sóknini var› tikin í n‡tslu*

JAN MÜLLER



*Frá hátí›arløtuni leygardagin, tá n‡ggi skúlin var› tikin alment í n‡tslu. Kór sang fyri teimum mongu bygdafólkunum, i› høvdu leita› sær oman á skúlan. Rúmligt er í tí stóra salinum.*

Mynd: jan

Torbjørn Jacobsen vísti á, hvussu gingi› var› undan í sóknini, tá fyrsti veruligi skúlin í Føroyum – prestaskúlin í Kirkjubø – var› settur á stovn í 12. øld og nevndi, at Sverri kongur gekk í hesum skúla. – Nú hava tit so aftur gingi› undan í sóknini. Hetta er tann fyrsti n‡bygdi skúlin í hesi øldini seg›i landsst‡risma›urin, sum fegna›ist um n‡ggja bygningin, i› hann helt vera glæsiligan á at líta men vísti samtí›is á, at eingin bygningur er sterkari enn tann grundvøllur, sum hann er grunda›ur á.

– Grundvøllurin er ivaleyst í lagi, men alt skúlans arbei›i veldst um tann andaliga grundvøllin innanh‡sis millum lærara, næmingar og foreldur. Ver›ur alt skúlans virksemi grunda› á samstarvsandan og vilja til at fremja stórverk næmingunum til frama, fer ta› at grógva um gangandi fót, sóknarbørnunum til miklan sóma.

Torbjørn Jacobsen seg›i ví›ari, at bygdaskúlin skal ver›a mentanardepilin í sóknini. – Lati› børnini og ungdómin kunna seg um føroyska mentan og hjálp teimum at fata a›rar mentanir og samspæl manna vi› náttúruna.

Landsst‡risma›urin helt fyri, at fólk í hesi sóknini dugdu at ganga undan, eisini tá ta› ráddi um skúlaskap og ba› hann til, at hetta framvegis fór at ver›a ey›kenni› fyri sóknina. Hann ynskti bygdafólkinum tillukku vi› n‡ggja skúlanum, men hóast hann ikki kundi lova teimum gull og grønar skógir, so ynskti hann teimum blí›an byr á lei›ini.

## Bygdaskúlin hvørvisteinur í menningini

Ta› er ikki hvønndagshending, at n‡ggjur skúli ver›ur tikin í brúk. Helst tí var› eisini sjálvt løgmansembæti umbo›a› á samkomuni á Velbasta› leygardagin. Høgni Hoydal, varaløgma›ur røddi um ta› hann nevndi eina ta mest rørandi og kenslubornu hendingina, sum fer fram á hvørjum ári, men bert einafer› í lívinum hjá hvørjum einstøkum, nevniliga at fara í skúla fyrstu fer›.

– Vi› n‡ggjum taskum – á tremur vi› forvitni og vónum og kærleika til lívi› - ganga øll inn í skúlan, inn í fólkaskúlan, sum er tann t‡dningarmesti smeltipotturin í lívinum hjá hvørjum einstøkum. Her skulu kør fyllast vi› vitan, her skulu vit br‡nast til sosialar ábyrgdarpersónar. Her skulu vit forelska okkum, hava hjartasorg, uppliva stóra gle›i og eisini ni›urløg.

Varaløgma›ur helt ta› vera eina ta t‡dningarmestu hendingina í lívinum hjá eini bygd, eini sókn ella kommunu at byggja ein skúla. Hann vísti á, at bygdaskúlin hevur veri› og fer at vera hvørvisteinurin í menningini hjá eini bygd og einum landi.

Høgni Hoydal nam eisini vi› fortí›ina og vísti á ta sannroynd, at í hesi sóknini lá prestaskúli í síni tí›, og her hevur eisini strí›i› sta›i› fyri einum føroyskum skúla og hava fleiri stórmenni havt sína vøggu her.

Varaløgma›ur helt fyri, at hóast karmarnir hava veri› smáir og umstø›urnar ikki tær bestu, so hevur bori› til at skapt ein gó›an skúla. Nú broytast hesir karmar og metti hann, at fólki› í sóknini fór eisini at megna at koyra n‡tt og gott innihald í skúlan.

Hann enda›i vi› at minna á, at skúlin er ikki bara fyri børn, lærarar og foreldur. Hann er mentanarmi›depil fyri bygdirnar og fyri alt landi›.



*Bygdarrá›sforma›urin og skúlastjórin uttan fyri n‡ggja skúlan.*

Mynd: jan



*Tr‡ av teimum elstu fólkunum í sóknini her saman vi› teimum bá›um yngstu. Fv. Dánjal Pauli Danielsen vi› Gu›ri› Egholm í fanginum, sí›ani Sámal Patursson og Bergit Mikkelsen vi› Bár›i Dalsgar› í fanginum.*

Mynd: jan



# Kunnu læra av hvørjum ø›rum

JAN MÜLLER

– Velbasta›ur er ikki so langt frá Havnini, men er kortini bygdaskúli. Kunnu vit ikki læra av hvørjum ø›rum – vitja hvønn annan kanska? spurdi Natte Nattestad, stjóri á Venjingarskúlanum á samkomuni á n‡ggja skúlanum á Velbasta› leygardagin.

Hann metti børnini á Velbasta› at vera heppin, at stutt er út í náttúruna, bæ›i ni›an í hagan og oman til sjóvarmálan. Ta› ger alt uppaftur meira spennandi. Í so máta hevur hesin skúlin óavmarka›a vídd, og tí nógvar møguleikar vísti stjórin á høvu›ssta›arskúlanum á.

Hann helt ta› vera hugaligt at uppliva, at eitt bygdará› tekur mentanarstovnin »skúlan« í so stórum álvara, at ta› dugir at síggja, hvønn t‡dning ta› hevur fyri ta› lítla samfelagi›, at skúlin hevur gó›ar karmar at virka í. At ta› er ikki nóg miki› vi› eini ferhyrntari stovu, har i› ta› ber til at læra børnini.

Natte Nattestad vísti á, at skúlin í dag er so nógv anna› og nevndi tær mongu lærugreinarnar. Uppgávan hjá læraranum er vor›in so nógv størri og ta› eru lærarnir eisini fúsir til at taka sær av. Men ein fortreyt er tó, at teir ytru karmarnir eru í lagi. At tú eisini hevur møguleikan at ví›ka rásarúmi›, tá brúk er fyri tí.

Ta› er ikki so langt sí›ani, at skúlastovan var kongaríki› hjá tí einstaka læraranum. Har slapp eingin annar inn. Ta›, sum fór fram, var millum lærara og næming. Nú er ø›rvísi. Nú er samstarv millum lærarar á øllum økjum. – Samstarv er gott og alney›ugt, men ta› krevur eisini ómetaliga nógv av øllum og vísti hann á økta arbei›i hjá lærarunum. Ta› er tó greitt, at økta arbei›sbyr›an krevur eisii stóra vælvild.

Skúlastjórin umrøddi sí›ani børnini sum okkara rávøru. – Okkara uppgáva er at gó›ska hesa rávøru – ikki til útflutnings men til n‡tslu her í landinum, og ta› uttan mun til hvussu st‡risskipan okkara ver›ur í framtí›ini. Hann metti uppgávuna hjá teimum, sum skipa fyri í samfelagnum, at vera at skapa karmarnar.

– Hvussu skal ein gó›ur skipari fáa naka› burturúr, hevur hann ikki eitt gott skip, gó› ambo› og veit, hvar i› hann kann fiska. Tá ver›ur lættari at fáa gó›a manning. Og solei›is má ta› eisini vera vi› skúlanum. Ta› hava tit skilt á Velbasta›.



*Flestu av bygdabørnunum í sóknini inni í stóra salinum í n‡ggja skúlanum seinasta leygardag.*

Mynd: jan

# Fyrimyndin hjá ø›rum

JAN MÜLLER

– Vi› n‡ggja skúlanum er eisini skaptur ein gó›ur karmur um mentanarvirksemi› í sóknini. Avger›in hjá myndugleikunum at lata skúlan vera henda karm samsvarar sum fótur í hosu vi› ta ætlan, sum Fólkaskúladeildin hevur um hesi vi›urskifti seg›i Hensar Ellingsgaard, deildarstjóri í Undirvísingar- og Mentamálast‡rinum, tá hann bar gó›ynski fram fyri bygdafólki› á Velbasta› leygardagin.

Hensar Ellingsgaard metti eisini, at hesin skúlin fór at ver›a ø›rum til fyrimyndar. Men ætlanin um skúlan sum mentanardepil í sóknini fer at krevja skipa› samstarv, har skúlalei›ari er uppií. – Skúlin skal sjálvsagt altí› ver›a tøkur til ta dagligu undirvísingina. Ta› veldst um tykkum, sum skulu brúka skúlan, og ta› veldst um li›iligelika og samstarv av øllum pørtum. Hensar Ellingsgaard helt fyri, at ta› ræ›ur um at geva børnunum og ungdóminum gott í beinini. Ta› ræ›ur um anna› enn sunnan kost, gó›a útbúgving, trygg ættarbond og gó›u húsavi›urskifti. Føroysk mentan skal vera ein a›altáttur í uppalingini. Lati› børnini og ungdómin kenna seg aftur í hollari mentan saman vi› vaksnum. Og sleppi› ikki børnunum og teimum ungu leysum, fyrr enn tey hava ta kjølfestu, sum hevur givi› teimum gott í beinini.

Deildarstjórin helt ta› ræ›ur um gó›a bygdarmentan og vísti á, at mentan er eisini at vir›a ymiska ásko›an. – Gir›i› ikki børnini og tey ungu inni. Lati› tey sleppa út um eingjargar›in, ikki sum heimfø›ingar, men vi› hollum førnini og ví›um sjónarringi.

Hensar Ellingsgaard seg›i eisini, at dagsins skúli skal leggja dent á, at allir næmingar kunnu fáa avbjó›ingar. Tú røkkur ongum uttan slíkar. Hann nam eisini vi› leiklutin hjá foreldrunum, sum ver›a at ásanna, at fólk eru sett at røkja skúlans uppgávur. Ta› er í samarbei›i vi› hesi fólk, at foreldrauppgávan vi› atliti at skúladegnum skal ver›a røkt.

– Tú hoyrir mangan um næmingar, i› tíma illa at vera í skúlanum. Ta› er ein serlig uppgáva at fáa allar næmingar at kenna seg væl í skúlanum. Ta› er í tílíkum høpi, at foreldrini skulu gera sær serligan ómak at hjálpa skúlanum.

Hensar Ellingsgaard hev›i vegna Fólkaskúladeildina eitt inniligt ynski um, at skúli, foreldur og myndugleikar fara undir verki› vi› einum positivum hugbur›i.






gult cyan magenta svart